# SKEIÐ FYRISITING 2021


Nýggjur í nevnd
Fótbóltsfyrisiting
Fótbóltsleiðsla

# Núggjur í nevnd

- Endamálið við skeiðinum er at geva nevndarlimum kunning um, hvussu føroyskur fótbóltur er skipaður
- Skeiðið er ætlað bæði núggjum og verandi nevndarlimum
- Skeiðið tekur útgangsstøði í leiðsluhondbókini hjá Fótbóltssamband Føroya, ið eisini verður útflúggjað í samband við skeiðið
- Ætlanin er, at skeiðið verður hildið úti í felagnum, men møguleiki er fyri, at fleiri feløg kunnu hava skeið saman, so møguleiki er fyri at *sparra millum feløgini*
- Skeiðið er umleið 3 tímar
- Kostnaður: Ókeypis

# Fótbóltsfyrisiting

- Endamálið við skeiðinum er at geva samskiparum (o.ø. áhugaðum) innlit í viðkomandi reglugerðir og mannagongdir í samband við virksemið í feløgunum

- Skeiðið tekur útgangsstøði í leiðsluhondbókini hjá Fótbóltssambandinum og teimum lógum og reglum, ið eru viðkomandi

- Skeiðið er skipað yvir tríggjar dagar og tilsamans 14 tímar

- Kostnaður: 395,00 kr. pr. luttakara (íroknað mat)

- Tilmeldingarfreist: 29. januar 2021

| 6. februar 2021<br>09:00 – 15:00<br>Tórsvøllur | 17. februar 2021<br>17:30 – 21:30<br>Svangaskarð | 24. februar 2021<br>17:30 – 21:30<br>Tórsvøllur |
|---|---|---|
| • Intro<br>• Comet<br>• TMS | • Fyrisitingarlig viðurskifti í Stevnuni 2021<br>• Match-fixing | • Reglugerðir og lógarverk<br>• Altjóða dystir<br>• Intranet<br>• Tryggingar |

# Fótbóltsleiðsla

- Endamálið við skeiðinum er at førleikamenna nevndirnar í føroysku fótbóltsfeløgunum, samstundis sum tað skal vera við til at styrkja feløgini fyrisitingarliga. Skeiðið tekur fyrst og fremst útgangsstøði í praktiskum royndum, men nakað av teori verður eisini brúkt fyri at undirbyggja hetta

- Skeiðið er skipað yvir 3 modul (á uml. 15 tímar) og eina námsferð

- Kostnaður : 2.995,00 kr. pr. luttakara

- Prísurin er íroknaður ferðing og gisting í samband við námsferðina (nátturði er ikki íroknaður á ferðini).

- Tilmeldingarfreist: 29. januar 2021

# Modul 1 - Strategi

- Endamálið við hesum modulinum er at eggja til, at feløgini hava eina ætlan / strategi fyri felagið, har man saman í felagnum setur kósina fyri felagið og hvussu man á bestan hátt skipar felagið í daglig degnum
- Sum partur av hesum modulinum er møguleiki fyri, at felagið saman við FSF skipar fyri einum strategi degi í felagnum, har arbeitt verður ítøkiliga við einari ætlan fyri felagið

| | | | |
|---|---|---|---|
| 6. mars 2021<br>09:00 – 15:00 | 17. mars 2021<br>(online)<br>1 tíma<br>Íblástur frá Ulrik Børresen (NFF) | 31. mars 2021<br>(online)<br>1 tíma<br>Íblástur frá Henrik Selch (DBU K) | 14. apríl 2021<br>17:00 – 21:00 |

# Modul 2 - Sjálvboðin

- Endamálið við hesum modulinum er at fáa íblástur til, hvussu sjálvbodna arbeiðið í felagnum verður skipað á bestan hátt. Komið verður inn á, hvat kann gerast fyri at fáa fleiri sjálvboðin og hvat kann gerast fyri, at fólk halda fram sum sjálvboðin í felagnum

- Sum partur partur av hesum modulinum er møguleiki fyri, at felagið saman við FSF kann gera eina klubhondbók, ið er ein niðurskriving av teimum uppgávum, ið eru í felagnum.

8. mai 2021
09:00 – 15:00

→

26. mai 2021
17:00 – 21:00

→

16. juni 2021
17:00 – 21:00

# Modul 3 - Námsferð

- Námsferð til Danmarkar, har møguleiki er at fáa íblástur frá feløgum. Samstundis sum tað vónandi kann vera við til at skipa og menna eitt netverk millum luttakararnar, ið vónandi kann tryggja eitt enn betri samstarv millum feløgini

- Fráferð: hósdag 9. september 2021 kl. 19:25

- Heimferð: sunnudag 12. september 2021 kl. 18:35

# Modul 4 – Leiðsla og skipan av felagnum

- Endamálið við hesum modulinum er at arbeiða við, hvussu vit skipa felagið á bestan hátt, har vit samstundis tryggja, at arbeiðið frá modul 1 og modul 2 verður brúkt í praksis
- Í hesum modulinum verður eisini komið inn á leiðslu og nevndararbeiði

6. november 2021
09:00 – 16:00

→

17. november 2021
17:00 – 21:00

→

8. december 2021
17:00 – 21:00